


***Nr. 13*** ***23. juni 2013*** ***73. árg.***

# Hav koddan við

Jesus segði um seg sjálvan: "Eg geri einki av mær sjálvum, men tali, soleiðis sum faðir mín hevur lært meg tað." (Jóh. 8,28)

Í Mark. 4,35-41 lesa vit um óveðrið á vatninum. Jesus sigur við lærusveinarnar: "Latum okkum fara yvirum, yvir á hina síðuna av vatninum." Av tí at Jesus einki ger av sær sjálvum, so hevur hann fingið hesi boðini frá Faðirinum. Hetta hevur verið ein stórur bátur, tí allir lærusveinarnir vóru við.

Tá brast harðveður á, og aldurnar skolaðu inn í bátin, so at hann var um at fyllast. Jesus lá í bakskutinum og svav á einum kodda. Lærusveinarnir vaktu Jesus og søgdu: "Meistari, leggur tú ikki í, at vit ganga burtur?"

Jesus fór upp og hótti at vindinum og segði við vatnið: "Tig, ver kvirt!" Tá gjørdist blikalogn. Jesus segði við teir: "Hví eru tit so ræddir? Hava tit enn onga trúgv?"

Hvat hevði hent, um lærusveinarnir ikki høvdu vakt Jesus? Ein áhugaverdur spurningur. Einki hevði hent! Jesus hevði jú sagt: "Latum okkum fara tvørturum, yvir á hina síðuna." Altso høvdu teir fingið lyftið um at lenda í øllum góðum hinumegin vatnið. Men teir hyggja at umstøðunum og fyllast við ræðslu og gloyma tað, sum Jesus hevur lært teir: "Frið lati eg eftir hjá tykkum, mín frið gevi eg tykkum; eg gevi tykkum ikki eins og heimurin gevur. Hjarta tykkara óttist ikki og ræðist ikki!" (Jóh. 14,27) Vit skulu broytast innanífrá og út og ikki uttanífrá og inn.

Tá ið teir lenda hinumegin, lesa vit víðari í 5. kap., kemur ein maður við illum andum oman ímóti teimum. Hann var so óður, at hann sleit leinkjurnar sundur, og eingin var mentur at binda ella temja hann. Hann búði í gravarhellunum. Ein heil legión av óndum andum búðu í honum. Ein legión er annars ein herdeild, sum telur umleið 6.000 menn. Jesus grøðir henda mannin og fer síðani aftur í bátin yvirumaftur. (v. 21)

Altso, einasta ørindi hansara, tá ið hann fór tvørtur um vatnið, var at grøða henda neyðars mann. Eg ivist onga løtu í, at hasin stormurin, sum brast á, var ein satanisk ódn, ein roynd hjá Satani at krøkja seg í tað, sum

hann hevur, og at gera ein enda á Jesusi og lærusveinunum. Men tað ber als ikki til, tí Jesus er sterkari.

Tú og eg og øll onnur menniskju sita í hvør sínum lívsbáti og eru á veg yvirum. Um tað skal gangast okkum væl, mugu vit hava Jesus við í bátinum - vit mugu hava bjóðað honum inn í okkara hjarta. (Jóh. 1,12) Tá eiga vit eisini lyfti um, at vit skulu lenda í øllum góðum hinumegin.

Viðhvørt er gott veður og sólskin á leiðini; men so alt í einum bróta sjógvarnir inn yvir bátin. Fyrst av øllum vil eg, at tú skalt minnast til, at ein ódn varar ikki ævigt. Hon gevst einaferð. Ódnirnar eru tann mótgangur, sum vit møta: sjúka, fíggjarligir trupulleikar, trupulleikar á arbeiðsplássinum, hjúnafelagin er ótrúgvur og rýmir, deyðin vitjar, børnini koma illa fyri o.s.fr.

Hvat gera vit tá? Jú, tá skulu vit gera sum Jesus, leggja okkum á koddan og slappa av og lata hansara frið ráða í hjartanum. Men koddin, hvat ímyndar hann? Bíbliuna við øllum lyftunum. Les Guds orð hvønn dag. Fyll teg við tí og lær teg lyftini uttanat. Hav “koddan” við tær, hvar enn tú fert.

At enda vil eg siga frá einum manni, sum hevði “koddan” við sær. Fyri nøkrum árum síðani var ein stór flogvanlukka á Kanariuoyggjunum. Tvey flogfør rendu frontalt saman, og nógv fólk doyðu. Flestu tykkara munnu minnast tað, tí tað er ein tann størsta vanlukkan í flogsøguni.

Ein maður komst undan. Hann var ein trúgvandi maður. Hann sat skorðaður fastur í setrinum og slapp ikki leysur. Uppi yvir honum var eitt hol í takinum. Eldurin nærkaðist honum frá øllum síðum. Eldkúlur duttu niður yvir fólk og skrædlaðu húðina av teimum.

Tá rópti hesin maður, so hart hann var mentur: “Eg standi fast uppi á Guds lyftum!!!” Í somu stund varð hann lyftur úr sessinum, upp gjøgnum holið og stóð nú á takinum. Hann sá ongan, men hann visti, at tað vóru einglar, sum høvdu útint hetta verkið.

So rópti hann á øðrum sinni: “Eg standi fast uppi á Guds lyftum!!” Tá varð hann lyftur niður á vøllin og stóð á tí turra grasinum.

Hann hevði havt “koddan” við sær. Ger tú so við.

*Erik Bedsvaag,* ESTV.
*Effie Campbell* umsetti.

**Far til Harran Jesus, vinur.**

*Far til Harran Jesus, vinur,*
*sig tú honum tína neyð,*
*sig, tað pínir teg so sáran,*
*at tú ert so køld og deyð.*
*Sig við Jesus tað, tú ikki*
*nøkrum øðrum siga kann.*
*Hann vil ugga, Hann vil hjálpa,*
*eingin skilir teg sum Hann.* *E. C. ums.*

# Hann varð settur í frælsi

Ein maður sunnanfjørðs vitnaði á hvítusunnustevnuni í Kollafirði.

"Mær dámdi væl at smakka mær á, og sum tíðin leið, vant tað meir og meir upp á seg, og at endanum var tað ein trupulleiki. Konan var frelst og gekk í Missiónshúsið. Hon hevði ofta at mær; men alkoholikarar eru snildir og snúnir, so tá ið hon fór at deila, plagdi eg at siga: "Komið og fáið okkum eitt mannakorn!" So steðgaði deilingin!

Ein dagin sigur konan so syrgin við meg: "Tú skuldi skammast av tær, nú ganga børnini og happa son okkara, av tí at tú gongur og vøsar fullur húsanna millum!"

Eg fekk ein skelk, tí eg vildi sanniliga ikki vera orsøkin til, at sonurin skuldi líða og verða happaður. Tá ið hann løtu seinni kom inn, spurdi eg: "Verður tú happaður, av tí at pápi gongur fullur?" Børn eru so trúgv og stuðla altíð sínum foreldrum, so tað kom eitt sindur drálandi frá honum: "Neiii!"

"Hoyr," segði eg við hann, "hereftir skalt tú ongantíð síggja pápa fullan!" Og tað havi eg hildið í øll hesi mongu ár. Eg hevði kortini gjørt mær eitt loyniligt skáp niðri í kjallaranum, har eg goymdi eina fløsku, um mær skuldi tørva hana; men eg nart hana ongantíð.

Eg gekk dúgliga í Missiónshúsið við konuni. Øll hildu, at eg var frelstur; men tað var eg ikki. Hetta var bara ein útvortis vani, eg hevði ikki takkað Jesusi fyri frelsuna, so eingin broyting var hend innan í mær. Í fyrstani, tá ið eg sat á møti, bankaði hjartað hart. Eg hevði hoyrt ein gamlan mann vitna, at tá ið tú merkti hjartað banka, so var tað Jesus, sum stóð uttanfyri og bankaði á tínar hjartadyr, tí hann vildi sleppa inn. Um tú ikki lovaði honum inn, so fór hjartabankanin at gerast veikari og veikari fyri hvørja ferð, og at enda var eingin hjartabankan, tí Jesus var farin avstað og kallaði ikki longur á teg.

Júst soleiðis var tað hjá mær. Eitt kvøldið, tá ið eg sat á møti, var bankanin so sera veik. Eg gjørdist lívsræddur, tí eg óttaðist at missa kallið, og at Jesus skuldi rýma, tí so visti eg, at hjartað fór at gerast sum ein steinur. Eg bað spakuliga innantanna: "Jesus, er tað tú, sum bankar? Kanst tú ikki banka øgiliga hart, so at eg veit, at tað er tú?" Eg skal siga tykkum, at hjartað fór at duka. Eg helt næstan, at tað sprakk út úr bringuni á mær. Eg visti ikki av, fyrr enn eg leyp á føtur og takkaði Jesusi fyri, at hann var deyður fyri meg.

Í somu løtu streymaðu friðurin og gleðin inn í meg, og eg var settur í frælsi. Nú var tað ikki eg, sum stríddist at halda meg edrúan, nei, nú hvíldi eg, tí Jesus hevði tikið alla alkoholtrongd frá mær."

*Effie Campbell* umsetti.

# Krúnan

Evangelisturin Reinhard Bonnke hevur havt sítt virki í Afrika síðani 1967. Hann hevur talað fyri yvir 120 mill., og hann hevur biðið frelsubønina við 72 mill.

Eina náttina hevði hann ein dreym, eina sjón. Hann droymdi, at hann var ryktur upp til himmals, og har hitti hann Jesus. Harrin læt einar dyr upp og vísti honum inn. Rúmið var fylt við krúnum, ymiskar í støðd, og summar vóru vakrari prýddar enn aðrar. Bonnke fór yvir ímóti einari, sum var serliga stór og prýðilig.

Tá talaði Jesus og spurdi: “Hvar fert tú?” Bonnke svaraði: “Yvir til mína krúnu.” Jesus svaraði honum: “Tú eigur ikki hasa krúnuna!” Bilsin spurdi Bonnke: “Íðan, hvør eigur hana so?” - “Tað ger ein gomul kona,” svaraði Harrin.

So dró Jesus eitt lørift niður, og ein mynd av einari konu sást á tí. “Henda konan er ókend fyri teimum flestu. Eingin hevur lagt merkis til hennara. Hon hevur sitið aftast á møtunum, og har hevur hon trúliga sitið í bøn fyri tær. Harafturat hevur hon ofrað regluliga pengar til títt arbeiði. Handa krúnan liggur og bíðar eftir henni.”

Tað kostar at reka Guds ríkis arbeiði. Mafian fíggjar tað ikki, tað mugu vit kristnu gera. “Jóhanna, kona Kúsa, húsfúta Heródesar, og Súsanna og mangar aðrar, sum tænaðu teimum við tí, sum tær áttu.” Luk. 8,3. Her verða bara kvinnur nevndar; men tað eru sjálvandi eisini menn, sum eru gávumildir. Her niðri ganga vit á svørtum asfaltvegi, í himli skulu vit ganga á gullgøtum. Bíblian nevnir eisini eina aðra gávumilda konu, Tabita. “Men í Joppe var ein lærisveinur, ein kvinna, Tabita at navni, sum, tá ið tað er útlagt, merkir hind. Hon var rík av góðum gerðum og olmussugávum, sum hon gav.” Áps. 9,36.

Vit tæna eisini Gudi við at biðja. “Anna Fanuelsdóttir hevði nú sitið einkja fram at fýra og áttati ára aldri. Hon veik ikki úr halgidóminum, og tænaði Gudi við føstu og bønahaldi nátt og dag.” Luk. 2,37. Um heidningin Kornelius stendur skrivað, at hann fekk vitjan av einum Guds eingli, sum segði við hann: “Bønir tínar og olmussur tínar eru farnar upp til áminnilsi hjá Gudi.” Áps. 10,4. Harrin gloymir ikki sínar tænarar.

*Effie Campbell.*

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23. juni. | Tekstur: Jóh. 8,2-11 + 6,37b | bíbliuorð: | Dán. 9,9a |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74